## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Strúkur í vindi ella hvassur vindur av landsynningi og stundum regn. Hitin millum 7 og 10 stig.




**Veðrið Pálmasunnudag:**
Strúkur í vindi ella hvassur vindur av suðri og útsynningi og ælingur, men onkur sólglotti. Hitin millum 9 og 12 stig.




**Veðrið mánadagin:**
Strúkur í vindi ella hvassur vindur av útsynningi og ælingur, partvís vátakavi. Hitin millum 1 og 4 stig.

**Veðrið týsdagin og mikudagin:**
Hvassur vindur ella skrið av útsynningi og stundum regn ella ælingur. Hitin millum 6 og 10 stig.

# Til Hawaii at hugna sær

**Børnini í Innistovu fóru mikudagin ein túr til Hawaii fyri at sleppa burtur frá øllum kuldanum í Føroyum**

BØRN
*Ragnhild Ellingsgaard*

**Klaksvík, Sosialurin:** – Skundið tykkum, flúgvarin fer skjótt avstað !

Soleiðis varð rópt úti í gongini í Mylnuhúsinum tíðliga mikumorgunin. Øll børnini í Innistovu skuldu nevniliga ein túr til Hawaii, har tey ætlaðu sóla sær í nakrar tímar.

Øll børnini runnu avstað at finna passini og billettirnar, sum tey sjálvi høvdu klipt og límað nakrar dagar frammanundan, og so varð farið umborð á flogfarið.

Umborð fingu børnini sodavatn, ananas og jarðber frá fryntiligu flogternuri, sum nýtti ein kontórstól sum rulliborð.

Langt var at flúgva, og á túrinum flugu tey eisini framvið stóra landinum Afrika, og har var mangt spennandi at síggja. Bæði filar og giraffar gingu framvið uttanfyri, og ein drongur helt seg heilt vist síggja eitt stinkdýr eisini.

### Vitjaðu strondina

Tá flogfarið lendi á Hawaii, stóðu fólk klár á flogvøllinum at taka ímóti teimum. Tey fingu hvør sín blomstkrans um høvdið, og eisini nakrir peningaseðlar, so tey kundu keypa sær okkurt at eta á túrinum.

Men allarfyrst skuldi strondin upplivast. Børnini skundaðu sær avstað við øllum viðføringum, og komin á strondina vóru klæðini skift út við meir hóskandi summarklæðir. Sólkrem lá eisini í hvørjum kufferti, og tey skiftust so um at smyrja hvønn annan inn. Eingin skuldi gerast sólbrendur á hesum rimmar túri.

Tá tey høvdu ligið undir sólini eina løtu, gjørdist tað í so heitt, men tíanbetur kundu tey fara í svimjihylin at svala sær á eina løtu.

Eftir hetta var fari út á eina fína matstovu, har børnini fingu pizza og nekarakyss at eta, og hetta dámdu teimum bara heilt væl.

Síðan fóru tey aftur á strondina, har tey hugnaðu sær líka til flogfarið aftur fór til Føroyar. Hugurin var ikki so góður at fara aftur í kuldan, men heima bíðaðu mammurnar og páparnir, so einki var at gera.

### Væl fyrireikað

Frá starvsfólkunum í Mylnuhúsinum frætta vit, at tey longu fór undir at fyrireika túrin fyri 2 vikum síðani. Børnini hava vitjað eina ferðaskrivstovu, har tey fingu ymiskt at vita um Hawaii, og eisini fingu tey eitt katalog heim við.

Teir síðstu dagarnar hava børnini klipt billettir, pass, pálmar, blómur og eina stóra sól, og hitaovnurin inni á stovuni var hendan dagin skrúðaður heilt frá, so tað kendist, sum vóru tey veruliga á Hawaii.

– Vit fóru undir hetta, tí børnini so spakuliga eru vorðin troytt av kavanum. Vit hildu, tey trongdu til ein stuttligan túr, og so fóru vit bara avstað. Og hetta hevur avgjørt verið eitt stórt upplivilsi, bæði fyri børnini og ikki minst okkum, sigur eitt av starvsfólkunum á stovuni.





## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷17 |
| Nuuk | ÷10 |
| Qaqortoq | ÷4 |
| Ammassalik | ÷1 |
| Saint John's | ÷1 |
| Halifax | 0 |
| Reykjavík | 3 |
| Seyðisfjørður | 0 |
| Tórshavn | 2 |
| Lerwick | 4 |
| Aberdeen | 4 |
| London | 13 |
| Tromsø | 0 |
| Bergen | 3 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 1 |
| Keypmannah. | 5 |
| Helsinki | 1 |
| Moskva | 5 |
| Berlin | 7 |
| Warzawa | 6 |
| Kiev | 4 |
| Bukarest | 13 |
| Paris | 15 |
| Madrid | 20 |
| Róm | 17 |
| Malorca | 16 |
| Athen | 18 |
| Malta | 18 |
| Tunis | 23 |
| Beijing | 10 |
| New Dehli | 31 |
| Bangkok | 33 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | – |
| New York | 10 |
| Miami | 26 |
| Los Angeles | 18 |
| Meksikobýur | – |
| Panama | 25 |
| La Paz | 12 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 24 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt hátrýst, 1031 hPa. eystan fyri Ísland fer eystureftir. Eitt lágtrýst, 966 hPa. á 45N-32V fer í landnyrðing.




Lágtrýstið í útsynning úr Ísland fer spakuliga norðureftir og brúgvalagið haðani verður við Føroyar leygardagin við vindi og regni.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 21/03 kl. 06⁰⁰– 22/03 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 1,2°
Minsti hiti máldur í mars: ÷8,7° Mesti hiti máldur í mars: 12,0°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,5 mm – mált frá 21/03 kl. 06⁰⁰– 22/03 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í mars: 29,9 mm


**Radio-verkstaður**

Umvæling av:
- Sjónvarpum
- Videotólum
- Hi-Fi

Vit umvæla:
PHILIPS
PANASONIC
SAMSUNG
og onnur merki

**Fokus ELEKTRONIK**
Reynstún 19 · Argir
Tlf. 311306 - Fax 311306

Brúdarlín
v/ Anniku Gaard
Fagralíð 22
Tlf./Fax. 314281

Brúðar- og brúðargentukjólar við tilhoyri til leigu

Nýggir kjólar kunnu útvegast


## VESTFALLSKYRRINDI

22. mars: Fyrra kvarter
28. mars: Fullmáni/Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2002

| Dagur | Suðuroyar—/ Vágafirði fp. | Suðuroyar—/ Vágafirði sp. | Skúvoyar—/ Skopunarfirði fp. | Skúvoyar—/ Skopunarfirði sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | Hestfirði/ Sundalagnum sp. | Vestmanna—sundi fp. | Vestmanna—sundi sp. | Mykines—firði fp. | Mykines—firði sp. | Nólsoyar—firði fp. | Nólsoyar—firði sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi sp. | Kalsoyar—/ Svínoyarfirði fp. | Kalsoyar—/ Svínoyarfirði sp. | Hvanna—sundi fp. | Hvanna—sundi sp. | Fugloyar—firði fp. | Fugloyar—firði sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 23. mar | 01.23 | 14.03 | 00.23 | 13.03 | 00.38 | 13.18 | 03.23 | 16.03 | 04.23 | 17.03 | — | 12.18 | 11.18 | 23.58 | 01.38 | 14.18 | 02.38 | 15.18 | 01.08 | 13.48 | 02.23 | 15.03 |
| 24. mar | 02.43 | 15.09 | 01.43 | 14.09 | 01.58 | 14.24 | 04.43 | 17.09 | 05.43 | 18.09 | 00.58 | 13.24 | — | 12.24 | 02.58 | 15.24 | 03.58 | 16.24 | 02.28 | 14.54 | 03.43 | 16.09 |
| 25. mar | 03.36 | 16.03 | 02.36 | 15.03 | 02.51 | 15.18 | 05.36 | 18.03 | 06.36 | 19.03 | 01.51 | 14.18 | 00.51 | 13.18 | 03.51 | 16.18 | 04.51 | 17.18 | 03.21 | 15.48 | 04.36 | 17.03 |
| 26. mar | 04.29 | 16.56 | 03.29 | 15.56 | 03.44 | 16.11 | 06.29 | 18.56 | 07.29 | 19.56 | 02.44 | 15.11 | 01.44 | 14.11 | 04.44 | 17.11 | 05.44 | 18.11 | 04.14 | 16.41 | 05.29 | 17.56 |

5 707265 100067 >